betri

–

Kappingarárið 2021

7. mars

Dagsins dystarbóltur er latin av:

Magna Thomassen

Leikskrá nr. 1

07 Vestur

Stovnað: 6. novembur 2007

Heimavallir:
Dungasandur í Sørvági
Valloyran í Sandavági

Postadressa:
Dungasandur 4, Sørvágur

Telefon: 590707

Telefax: 333550

E-postur:
07vestur@07vestur.fo

Heimasíða: www.07vestur.fo

Formaður:
Jón Nordendal

Næstformaður
Jens Kristian Haraldsen

Skrivari:
Finnbogi Niclasen

Peningarøkil:
Ingibjørn Johannesen

Nevndarlimir:
Egil Petersen
Eyðvør Petersen
Ove Heinesen
Rógvi Jacobsen

Ábyrgd:
Fróði Poulsen

Blaðbólkur:
Fróði Poulsen
Ingolf S. Olsen
Jóanis Albert Nielsen

Uppseting: Regin Davidsen

DAGFØRT BÚMERKIÐ

Síðan byrjanina hevur felagið brúkt eitt og sama búmerkið, sum Páll Joensen evnaði til. Páll hevur sjálvur gjørt nýtt, tillaga búmerkið, sum verður tað, vit framyvir koma at brúka.

Eftir navnakappingina, sum Magni Thomassen úr Sandavági og Jim Sonni Guttesen úr Sørvági funnu, varð útskrivað búmerkjakapping. Hesa vann Páll, og vit hava síðan brúkt hetta búmerkið, sum vit øll eru vorðin so góð við.

Ynski hevur tó verið, at fáa eitt búmerkið, sum ikki er eins avlangt, og, í fleiri før um, eisini í miðlunum, eru ymsar styttar útgávur nýttar.

Upprunaligi sniðgevin hevur nú tillaga búmerkið, og vit koma so framyvir at brúka hetta búmerkið, og tað upprunaliga fer so í søguna, sum eftirhondini er blivin 13 ár.

Stóra takk til Páll fyri gamla og nýggja búmerkið!

FÓTBÓLTURIN AFTUR Á RULL

Sunnudagin kl. 15 verður fyri fyrstu ferð í hálvt-triðja ár dystur í Betri Deildin í Sørvági, tá vit taka móti B36 í fyrsta umfari í nýggju kappingini.

Eftir nøkur buldrut ár í 1. deild hava vit endiliga vunni okkum pláss í bestu deildini, har vit sjálvsagt meina at felag okkara hoyrir til. Og tað fáa vit so ríkilan møguleika at prógva komandi 27 umførini, byrjandi sunnudagin, har eitt av toppliðunum seinastu nógvu árini, B36, stendur á hinari hálvuni.

Nógv er sjálvsagt broytt síðan vit spældu seinast í Betri Deildini. Seinasti heimadysturin var í oktobur í 2018, tá EB/Streymur vóru her vesturi á vitjan. Dysturin endaði við 3-3 javnleiki. Fýra av leikarunum, ið byrjaði inni tá, kunnu væntast at byrja inni nú, Silas, Martin, Dann og Asbjørn, meðan Tór-Ingar, Teitur og Jóanis byrjaðu á bonkinum tá, men kunnu væntast at spæla størri leiklut í nú, um annars skaðafríðir.

Nú er felagið so stabiliserað við stórum hópið av hjálparfólkið og góðum stuðli, og framtíðin tykist ljós. Eisini á fíggjarliga økinum er stýr komið á tingini við góðum úrslitið í fjør. Skal hetta vera árið, har vit endiliga fáa luft undir veingirnar?

Hópurin í Betri Deildini sær út til at vera klárur til kappingina. Venjingarnar hava verið góðar og neyðugu førleikarnir eru rundan um hópin við venjaranum Heðini Askham á odda. Síðan Heðin tók yvir miðskeiðis í fjør hava vit sað eina greiða spæliætlan, sum passar okkum væl, umframt at samanhaldið og moralurin ordiliga eru sett í hásætið.

Mótstøðan sunnudagin er tó sterk við B36, sum, við nýggjum venjara og høgum málum, uttan iva ætla sær pláss ovarliga ella ovast á stigatalvuni. Teir høvdu eina góða venjarakapping, og síggja út til at vera ein kandidatur til medaljupláss.

Dysturin verður í Sørvági sunnudagin kl. 15:00 - koyrið á 07 Vestur!

VESTMEK

MASKINVERKSTAÐUR & SMIÐJA

Vestmek bjóðar góða góðsku fyri góðan prís

VESTMEK

MASKINVERKSTAÐUR & SMIÐJA

Bryggjan 17 380 Sørvágur Faroe Isands www.vestmek.fo

Grannskoðan // Ráðgeving // Bókhald // Roknskapur

Skalt tú meta
um framtíðina
mást tú
kenna fortíðina

sendistovan

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

WWW.JANUAR.FO

Sand- og skervsølan
í Sandavági

Alt innan:
- tilfar
- veitan
- levering

Finn meg á
facebook

Tlf: 213577

Lastvognskoyring v/ Erhard Dam

RISIN
BÓKHALDSVIRKI

TEL. 58 43 89

VÓNRÍKUR 07-FORMAÐUR

Málið í ár er at hanga í í bestu deildini, sigur Jón Nordendal, formaður í 07 Vestur. Felagið arbeiðir miðvíst við at menna ungar leikarar at seta við, so felagið um nøkur ár ikki verður bundið av fremmandum leikarum

Ingolf S. Olsen

Tað er ongin loyna, at 07 Vestur hevur havt okkurt, ið líkist einari elevator-karrieru, síðani liðið fyrstu ferð vann seg upp í bestu deildina, men Jón Nordendal, formaður í 07 Vestur, vónar og væntar, at tann tíðin nú er farin.

Tí arbeiðið, sum nú fer fram í felagnum, gongur miðvíst út upp á, at felagið skal megna at bíta seg fast í Betri-deildini við egnum leikarum.

- Tað er heilt eyðsæð, at skal 07 Vestur stabilisera seg í Betri-deildini, so er neyðugt við einum framúr góðum ungdómsarbeiði, so vit fáa framleitt okkara egna leikaratilfar. Og fyri at tað skal bera til, er tað alneyðugt, at vit hava eitt ógvuliga gott venjingarumhvørvi til teir ungu spælararnar, umframt teir vaksnu sjálvandi, so teir síggja og kenna, at teir eins væl kunnu menna seg sum fótbóltsleikarar hjá 07 Vestur og hjá nøkrum øðrum felag – so at teir ikki fáa tráanina eftir at fara úr felagnum og halda, at tað er so ræðuliga nógv betur alla aðrastaðni, sigur Jón Nordendal.

- Eg haldi eisini, at vit nú eru har, at vit saktans kunnu kappast við tey liðini, vit samanbera okkum við, sum eru liðini í botn 5 í Betri-deildini. Men eg haldi avgjørt, at vit hava styrki til at vera í betra endanum av teimum fimm, sigur hann.

Á gáttini til kappingarárið setir formaðurin 07 Vestur, ÍF, EB/Streym, TB og B68 í botn 5.

Tol skal til

Ein orsøk til elevator-tilveruna hjá 07 Vestur heldur Jón Nordendal vera, at felagið ikki hevur verið nóg væl fyrireikað, tá liðið er flutt upp í bestu deildina. Ætlanirnar hava verið ov leysar í kantinum.

- Higartil hava vit ikki megnað at hildið fast í bestu deildini, og eg haldi, at tað hevur eitt sindur við tol at gera. Vit hava ikki havt tað neyðuga tolið, sum skal til at leggja eina ætlan fyri felagið og menna okkara egnu leikarar, so vit kunnu hála alt tilfeingið til, sum er í oynni, fyri at hava eitt lið, bygt upp um eina lokala kjarnu, í bestu deildini.

- Eg haldi eisini, at vit nú eru har, at vit saktans kunnu kappast við tey liðini, vit samanbera okkum við, og tað eru liðini í botn 5 í Betri-deildini. Men eg haldi avgjørt, at vit hava styrki til at vera í betra endanum av teimum fimm, sigur Jón Nordendal, formaður í 07 Vestur

- Tað hevur meira verið soleiðis, at fjáltur er komin á nevndina, tá vit eru fluttir upp, og so er felagið farið út og gjørt stórar íløgur í fremmandar spælarar. Tá tað so er kiksað kortini, og liðið er flutt niðuraftur, hevur tað sum oftast verið ein harður fíggjarligur smeitur fyri felagið, sigur hann.

Ónd ringrás

Og tað konseptið – ella mangul upp á sama – hevur havt avleiðingar fyri alt arbeiðið í felagnum, sigur formaðurin.

- Eg havi sjálvur sitið í nevndini í níggju ár og eigi tí ein stóran leiklut í skeivu raðfestingunum, sum hava verið. Man er fluttur niður við einum braki, og so hava ráð ikki verið at varðveita teir fremmandu spælararnar, samstundis sum íløgan í teir hevur gjørt, at okkara egnu ungu leikarar hava havt ringar umstøður og møguleikar at ment seg. Tí tá tú

(framhald á síðu 18)

BANKNORDIK

Heili 85% av føroyingum hava ikki nóg gott innlit í sína pensjón og sínar lívstryggingar. Ert tú ein av hesum?

Kanna tína støðu á **banknordik.fo/pensjon**

Ráðgeving, sum øll skilja

EM Asfalt

Tel. 22 51 10 & 22 47 16

jn.fo

VIÐLÌKAHALDSFRÌTT

PLASTKLÆDNING OG BJÀLVING

Vit umboða dygdar húsaklæðningin úr plast.
Týski klæðningurin er sera væl egnaður til føroyska veðurlagið.

10 ymiskir litir eru at velja í,
og horn og listar fáast í somu litum.

Brettini eru heill 6 metur til longdar.

SANDAVÁGS TIMBURHANDIL

Hillingatangi - 360 Sandavágur - Tlf. 332700 - www.timbur.fo

Bilasølan

STUÐLAR

07 VESTUR

ŠKODA

Flott snið og týsk góðska, tá hon er allarbest.

Sørvágs kommuna stuðlar 07 Vestur
Varðagøta 8 • FO-380 Sørvágur • www.sorvag.fo

Vága kommuna stuðlar 07 Vestur
www.vaga.fo
VÁGA KOMMUNA

DYSTARSKRÁ 2021 BETRIDEILDIN

1.	07-03-2021	07 Vestur - B36
2.	13-03-2021	07 Vestur - B68
3.	20-03-2021	ÍF - 07 Vestur
4	05-04-2021	07 Vestur - EB/Streymur
5.	11-04-2021	HB - 07 Vestur
6.	14-04-2021	TB - 07 Vestur
7.	25-04-2021	07 Vestur - Víkingur
8.	02-05-2021	07 Vestur - KÍ
9	08-05-2021	NSÍ - 07 Vestur
10.	13-05-2021	07 Vestur - KÍ
11.	16-05-2021	B36 - 07 Vestur
12.	24-05-2021	B68 - 07 Vestur
13.	12-06-2021	07 Vestur - ÍF
14.	20-06-2021	Víkingur - 07 Vestur
15.	26-06-2021	07 Vestur - NSÍ
16.	27-07-2021	07 Vestur - EB/Streymur
17.	02-08-2021	HB - 07 Vestur
18.	08-08-2021	07 Vestur - TB
19.	15-08-2021	EB/Streymur - 07 Vestur
20.	22-08-2021	ÍF - 07 Vestur
21.	28-08-2021	07 Vestur - B68
22.	12-09-2021	07 Vestur - B36
23.	19-09-2021	KÍ - 07 Vestur
24.	26-09-2021	07 Vestur - Víkingur
25.	17-10-2021	NSÍ - 07 Vestur
26.	24-10-2021	07 Vestur - HB
27.	30-10-2021	TB - 07 Vestur



unicar.fo

BILÚTLEIGAN, OG EISINI UMVÆLA VIT SKAÐAR,
LAKKERA OG SKIFTA RÚTAR + 298 544000

1. Silas Eyðsteinsson	23
2. Eiler Fróðason	18
3. Dánial Pauli Lervig	30
4. Dann Fróðason	21
5. Heine Mortensen	30
6. Tór-Ingar Akselsen	40
7. Høgni Egilstoft Nielsen	24
8. Martin Tausen	31
9. Martin Heilberg	25
10. Erling F. Myklebust	25
11. Zoran Vojovic	35
12. Marjus Egilstoft Nielsen	18
14. Ragnar Weihe	20
15. Asbjørn Heðinsson	21
16. Ari í H. Petersen	18
17. Ingi Joensen	19
18. Brandur Heinason	19
19. Albert Theis Nielsen	22
21. Teitur Olsen	23
22. Predrag Jeremic	33
23. Jóannis á Steig	24
24. Sølvi Egilsson	26
25. Trygvi Weihe	17
27. Sámuel Eyðsteinsson	20
28. Nóa Eyðsteinsson	16
Venjari: Heðin Askham	

2. Andrias H. Eriksen	26
3. Magnus Holm Jacobsen	20
4. Bjarni Petersen	22
5. Lukas Enevoldsen	27
6. Eli F. Nielsen	29
7. Bjarki C. Nielsen	22
8. Mathias Thrane	27
9. Hannes Agnarsson	21
11. Benjamin Heinesen	24
12. Alex Mellemgaard	28
14. Jóhann H. Joensen	19
15. Hugin Samuelsen	21
16. Símun Rógvi Hansen	33
17. Mattias W. Joensen	17
18. Andreas Thomsen	19
20. Andrass Thomsen	18
21. Brian Jacobsen	28
22. Sebastian Pingel	27
24. Ragnar Samuelsen	21
25. Mattias Lamhauge	21
28. Bárður Olsen	35
30. Martin Agnarsson	17
Venjari: Dan Brimsvík	

CARRO
carro.fo - 21 25 51

FAE VÁGA FLOGHAVN

Giljanes bussar koyra um alt landið

Tel. 21 98 99 giljanes@giljanes.fo

.fo
Vágaportalurin

Vágafólk lesa
Vágaportalin

.fo
Vágaportalurin

www.wt.fo



VisitVágar
part of the Faroe Islands

FOSSÁ

FROZEN FISH
LANDING

Hølcksmíð
v/Gerhard Hansen

Alt innan timburar-beiði

Tlf. 282710

Neinbjørn Nattestad
Bilverkstaður
Tlf. 332727 | Fax. 333727

MÚRARIN

V/ Kell E. Jensen
Kálvalíðvegur 10
370 Miðvág
tlf. 332779 og 222101
t-post: murarin@olivant.fo

[redacted]

[redacted]

(framhald av síðu 7)

hevur gjørt stórar íløgur í fremmandar leikarar, so mugu teir eisini sleppa at spæla. Tað hevur verið ein sovorðin ónd ringrás, sigur hann.
Men nú er málið at bíta seg fastan í Betri-deildini, og formaðurin sigur, at tað júst er við hesum í huga, at felagið hevur arbeitt tey seinastu tvey árini – at betra um umstøðurnar at menna egnar spælarar og fáa teir venjararnar, sum felagið heldur megna uppgávuna.

Ein góð íløga

Frammanundan gjørdi felagið fyri seks árum síðani eina sambært formanninum stak góða íløgu, tá tað setti Jens Erik Rasmussen í fulla tíð at venja og menna serliga teir yngstu spælararnar.
- Hann hevur gjørt eitt megnar arbeiði við at menna tey minstu børnini, so tey eru væl fyri tekniskt. Vit høvdu so skiftandi ungdómsvenjarar, men fyri hálvum øðrum ári síðani fingu vit Hegga Samuelsen inn sum høvuðsungdómsvenjara. Teir báðir stinga so út í kortið beint nú, hvussu okkara ungdómsarbeiði skal koyra – nevndin hevur sjálvandi saman við teimum strikað karmarnar upp, sum teir skulu virka innan fyri, greiðir Jón Nordendal frá.
Tí yvirskipaða málið er, at 07 Vestur um nøkur ár í fyrsta lagi skal klára seg við egnum leikarum – og hyggja uppeftir heldur enn niðureftir í Betri-deildini.
- Tað er tað, vit arbeiða hart fyri. Vit

eru tó ikki komin har til enn, at vit hava tað, sum skal til við egnum leikarum, og tí hava vit eisini nakrar útlendskar spælarar í hópinum í ár. Tað er sjálvandi fyri at hava nóg nógvar spælarar at taka av, tá skaðar og kanska okkurt leikbann stinga seg upp, men tað er eisini tí, vit vita, at tað hevur stóran týdning fyri okkara egnu leikarar, at liðið hevur tað leikaratalið, sum skal til fyri at fáa kvalitet í venjingini, sigur Jón Nordendal.

Venjarar velja

Heðin Askham er settur sum høvuðsvenjari hjá 07 Vestur, og sum spælandi hjálparvenjara hevur hann Tór-Ingar Akselsen afturat sær. Heðin Askham og Hegga Samuelsen hava eisini havt avgerandi ávirkan á spælarainnkeypini.
- Undanfarin ár hevur nevndin kanska verið ov nógv blandað upp í leikarakeyp og sovorðið, so tann parturin er í nógv størri mun latin til venjararnar. Teir báðir analysera liðið hjá okkum, analysera tørvin, leita sjálvir eftir leikarum og tosa við leikarar. Síðan koma teir til nevndina við einum tilmæli um, hvør eftir teirra

tykki skal fáast inn í hópin, greiðir Jón Nordendal frá.

Illa ílatnir viðmerkjarar

Onkrir fótbóltsviðmerkjarar, serliga í Kringvarpinum, hava havt onkrar viðmerkingar um brúkið av útlendingum í 07 Vestur. Tað eru atfinningar, sum formaðurin í felagnum stendur fullkomiliga spyrjandi yvir fyri.
- Serfrøðingarnir, sum eg havi hoyrt úttalað seg um hatta, mugu sigast at hava verið ógvuliga illa ílatnir. Tí tað er beinleiðis ósatt, sum teir hava sagt um okkara konsept. Teir hava samanborið okkum við B68 og hava sett spurnartekn við, hví vit ikki hava sama konsept sum teir. Og tá hugsa teir um nýtsluna av útlendingum.

Men seinasta kappingarár lógu vit og kappaðust við B68 um uppflyting, og tá kappingarárið byrjaði, høvdu vit tveir útlendingar í hópinum og teir tríggjar. Okkara konsept nú er, at vit skulu framleiða okkara egna leikaratilfar, men tað gerst ikki eftir einum degi, og fyri at hava eitt nøktandi venjingarumhvørvi hjá okkara egnu ungu leikarum er neyðugt at hava onkrar leikarar uttanífrá í einari skiftistíð, sigur Jón Nordendal.
07 Vestur hevur fýra útlendingar í hópinum, nú hol verður sett á kappingarárið, Zoran Vujovic og Saska Pedja Jeremic úr Serbia og norðmenninar Martin Heilberg og Erling F. Myklebust.

07 VESTUR VIÐ Í FREMSTU KVINNUDEILDINI

Á fyrsta sinni hevur 07Vestur lið lið í fremstu kvinnudeildini. Í komandi leikskrá seta vit sjóneykuna á kvinnufótbóltin í felagnum við eini longri grein.
Fyrsti dystur er ímóti HB, tann 20. mars á Dungasandi

BÓNUS
STUÐLAR ÍTRÓTTINUM Í NÆRUMHVØRVINUM
mánadag til leygardag | 9-22

Dalsbø Sp/f tlf. 228991

www.wt.fo



VESTPACK

VESTPACK

VESTPACK

Handilsvirkið Niclasen

Timburhandil og byggibúð

Handilsvirkið Niclasen - Bakkavegur 26
Teldupostur: niclasen@niclasen.fo
TLF: 33 20 01 - FAX: 33 20 50

SMIĐJAN
TEL 30 88 88

Klima

MTHøjgaard

Movement that inspires

Corning lækni og Spanska sjúka

K.H. Corning, lækni, og konan, sum var sjúkrasystur, vórðu send til Føroya av donsku heilsumyndugleikunum, vegna herviligu Sponska sjúku, sum breyt út í Føroyum í juni 1918. Dimmalætting skrivar, 28.12.1918, at tey komu beint fyri jól 1918 við "Botniu" og fóru beina leið til Vágar. - Læknaloysi var í Vágum á hesi tíð og vóru tey í Vágum til 22. januar 1919.

Leygardagin 4. januar 1919 skrivar Dimmalætting, at í Sørvági hevði Spanska sjúkan gjørt um seg um jóltíðir 1918, gingið um alla bygdina, og tey sjúku vóru oftast sera ring. Ein eldri kvinna og eitt barn vóru deyð av sjúkuni, og ein lá og stríddist. Í Miðvági vóru bert nøkur fá sjúk, meðan sjúkan eisini gekk ring í Sandavági.

Spanska sjúka var ein alheims farsótt, sum herjaði í 1918. Yvir 50 milliónir menniskju doyðu kring heimin. Hildið verður fyri vist at sjúkan byrjaði í USA og kom til Evropa við amerikanskum hermonnum undir Fyrra veraldarbardaga. Vegna kríggið varð hetta hildið dult, og ein av teim fyrstu heimspressan hoyrdi um, sum hevði fingið sjúkuna, var spanski kongurin Alfonso XIII. Hildið varð tí kring heimin, at sjúkan gekk serliga ring í Spaniu, og harav kom navnið, Spanska sjúkan.

Í Føroyum doyðu 13 av umleið 19.700 íbúgvum av sponsku sjúkuni. Tey, sum doyðu, doyðu í roynd og veru av lungnabrunanum, sum var fylgisjúka til beinkrímið. Í fleiri londum kom sjúkan í trimum umførum. Í Føroyum sær tað út til at hava verið tvey umfør. Sambært hagtølum frá táverandi landslæknanum sæst, at fyrstu útbrotini vóru í juni og juli 1918, síðani kom sjúkan aftur í oktober 1918 og nógv vórðu smittað til og við januar 1919. Sambært føroysku tíðindabløðunum doyðu fleiri fólk í Havn í oktobermánaði 1918.

Í gomlu roknskapunum hjá Miðvágs kommunu eru til skjals rokningar í smb. við at fáa Corning lækna og frú úr Havnini og til Miðvágs í desember 1918. Johan Johansen og tveir menn úr Havn skjútsaðu parið umborð á "Smiril" í Tórshavn og fingu 5 kr. fyri tað. Thomas Jacob Johansen úr Miðvági fekk 2,50 kr., fyri skytsa tey í land í Miðvági. – Eingin verulig kai var í Vágum á hesi tíð, bert atløgubrúgvar til smærri bátar.

Sum skilst hava kommunurnar í Vágum ikki goldið teimum løn fyri tíðina tey vóru her, men skuldu rinda fyri uppihald, heilvág og aðrar útreiðslur í smb. við uppihaldið. Eisini fyri heilivág, læknin sjálvur hevði brúkt av egnari goymslu. Har eru so goldnar 43 kr. til Corning lækna umframt 85 kr. til ymsar nevndar persónar, helst úr Havn, fyri heiligvág og vørur.

7. mai 1919 er uppgerð gjørd yvir útreiðslur hjá Miðvágs kommunu, sum

Summastaðni brúktu tey eisini maskur tá. Nunnur sita og gera maskur úr toy til Reyða kross. Myndin er úr USA, tá Spanska sjúkan herjaði har í 1918.

í fyrstu atløgu legði pening út, vegna uppihald hjá harra Corning og frú í Miðvági frá 20. desember 1918 til 22. januar 1919. Eftir hesi rokning hava tey ikki búð í læknahúsunum meðan tey vóru her, men gistu "á Støðini" hjá frú Heinesen, sum fekk 22 kr. fyri ómakin. Frú Niclasen hevði matgjørt og fekk 15 kr. fyri tað. Tvær tænastugentur høvdu hjálpt dr. Corning og frú meðan tey vóru her og fingu 25 kr. hvør fyri tað. Annars var rímuliga nógv keypt í tveimum handlum í Miðvági, tað er helst bæði vegna læknaparið og ikki minst vegna tilfar o.a. í smb. við sjúkutilburðirnar. Goldnar vóru 361,60 kr. til Rasmus Niclasen handil og 179,25 kr. til H.N. Niclasen handil. Sum vóru rímuliga nógvir pengar tá á døgum.

Samlaðu rokningarnar á tilsamans 636,85 kr., vóru býttar eftir fólkatalinum millum allar kommunurnar í Vága sýslu.

Í Dimmalætting 29. januar 1919 stóðu tvær takkarheilsanir saman á forsíðuni. Tann fyrra var úr Sandavági og hin vegna allar kommunurnar í oynni. Áður hevði ein tøkk verið úr Sørvági og ein onnur sæst eisini seinni í sama blað. 30. januar 1919 skrivar K.H. Corning, á donskum til kommunurnar í Vágum og takkar vegna seg og konuna fyri heilsanirnar.

Havi leita í listum yvir danskar læknar á hesi tíð, men ikki funnið hann, so ógreitt er hvønn tjóðskap hann hevði. Havi tí heldur ikki funnið mynd av teimum.

Familjubuffét

Mán-Hós: Kl. 16.30 – 20.00
Fríggjadag: Kl. 16.30 – 21.00
Leygardag og Sunnudag: Kl. 13.00 – 21.00

Et, alt tú orkar, fyri 139,-

(12 ár og eldri | Íroknað ísbuffét, sodavatn og kaffi/te)

Og títt barn etur fyri einans 70,-

(11 ár og yngri, saman við foreldrum. Íroknað ísbuffét og sodavatn)

Bólkar (min. 10 fólk) 100,-

(11 ár og yngri, saman við minst einum gjaldandi vaksnum. Íroknað ísbuffét og sodavatn)

Lat okkum ordna innkeypið og uppvaskið

PIZZA 67

www.pizza67.fo – Tel 356767

Vit hava 3 sløg av pizza, salat, 4 sløg av dressingi, nachos, nýbakað hvítleyksbreyð, høsnagrýtu, nuggets, buffalo høsnaveingir, várrullur, chips, rís og 5 sløg av sodavatni, og omaná fáa tit 7 sløg av ísi og kaffi.

HOTEL BRANDAN

ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo

SPORT 24

KEYP EISINI OKKARA VØRUR
Á FØROYA FEITASTA NETHANDLI

WWW.SKALKUR.FO

ÓKEYPIS TIL DYRNAR
Í ØLLUM FØROYUM.

| SMS 31 95 12 | SALTANGARÁ 45 95 12 |

SPEKT

løggildir
grannskoðarar

Staravegur 17
Postsmoga 3258
110 Tórshavn

Telefon 34 34 34
spekt@spekt.fo
www.spekt.fo

Bílegg títt kort her

betri.fo/fjepparakort

Øll hava rætt til góð
BARNAÁR
Drekka foreldur tíni ov illa?
Les meira á barnaár.fo
Modelmynd

HIDDENFJORD

RAISED IN THE WILD

Fyrsti alari í heiminum at gevast við flogflutningi

At flúgva vøru elvir til óneyðugt CO2-útlát.
Ov nógv CO2-útlát elvir til veðurlagsbroytingar.

Við at skifta til sjóflutning er CO2-útlátið fyri flutning til USA minkað við heili **94%**